gult38 cyan38 magenta38 svart38









# TILTØK

**Rhema á Hálsi**
Onki møti verður í Rhema sunnudagin vegna møti við Teresiu Wairimu í Ítróttarhøllini í Runavík um vikuskiftið.

**Meinigheitshúsið í Havn**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti við Regin Olsen, barnaansing verður.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti. Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

**Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Eingi møti verða í Filadelfia hetta vikuskiftið vegna møtirøðina í Runavík við Teresiu Wairimu. Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin kl. 15 í KFUK: Limafundur fyri KFUK við Beintu Haraldsen og Katrin á Borg Gaard. Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Anniku og Steingrím Niclasen. Evni: Merkið – reytt, blátt og hvítt.

**Filadelfia, Sundalagið**
Einki møti verður sunnudagin vegna møti í Runavík við Teresiu Wairimu.

**Nerija, Skáli:**
Osvald Kjærbo talar á evangeliska møtinum sunnudagin kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli og kl. 19 møti við Petur Magnusson, trúboðara.

**Keldan, Skálafirði**
Einki møti í vikuskiftinum vegna møti í ítróttarhøllini í Runavík við Teresiu Wairimu. www.keldan.fo

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti. Øll eru vælkomin.-

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti í kvøld kl. 20. Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti.

**Ørkin, Saltangará**
Einki møti verður sunnudagin vegna møtirøðina í ítróttarhøllini í Runavík. Húsmøti verður týskvøldið kl. 19 hjá Maybritt og Trúgva í Søldafirði.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Í kvøld kl. 20 verður ungdómsmøti við Torleif Johannesen sjómanstrúboðara. Sunnukvøldið kl. 18 møti. Øll eru vælkomin.






gult39 cyan39 magenta39 svart39

# BRÚDLEYP

Leygardagin 5. mei giftast Ingun (dóttir Binu og Jón Miðberg) og Sámuel (sonur Sólrún og Tummas Jacobsen).

Leygardagin 5. mai kl. 15 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Poula E. Reinert Petersen, Saltnes og Hanus M. Olsen, Norðragøta. Brúðarveitsla verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá á tlf. 447845 ella 441401 áðrenn 22. apríl.

Leygardagin 5. mai kl. 16.30 giftast í Miðvágs kirkju Sólbjørg Lindenskov, Nólsoy og Napolion Magnussen, Miðvágur. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá áðrenn 22. apríl á tlf. 327016, 333174 ella 332691. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00.

Leygardagin 2. juni giftast í Sumbiar kirkju Dorrit Bech, Lopra og Eyðtór Joensen, Sumba. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, kunnu ringja á tlf. 316027 lokal 401, 373300 ella 370546 áðrenn 1. mai.

Leygardagin 2. juni kl. 16.00 giftast í Sjóvar kirkju Angelie Jógvansdóttir, Vestmanna og Sveinbjørn Poulsen, Strendur. Veitslan verður í ítróttarhøllini í Vestmanna kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 23. mai á tlf. 424172, 424283 ella 447185.

# GULLBRÚDLEYP

24. apríl hava hjúnini Mina og Jóhan Petersen gullbrúdleyp. Brúdleypsadr. er: Storkehaven 4 h, 5884 Gudme, tlf. 0045 62252221.

Sunnudagin 20. mai hava hjúnini Esther og Eivind Petersen í Oyndarfirði gullbrúdleyp. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18. Tey, sum vilja gleðast saman við okkum, vera vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 444529 ella 444501 innan 14. mai.

# LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 21. apríl: Kári Rasmussen, tlf. 447010
Sunnudagin 22. apríl: Sverri Lamhauge, tlf. 448016

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

# TILTØK

**Soli Deo Gloria**
Mánadag kl. 20 bíbliutími og bønarmøti.
Hósdag kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 16.30 Alphaskeið (11-15 ár) kl. 18 møti við Kristoffur Olsen.

**Sandoy**
Møti við Sangkórinum í Siloa og Svenning av Lofti verða ikki sum lýst 21. og 22. apríl, men ístaðin 28. og 29. apríl soleiðis:
Leygardagin 28. útimøti í Húsavík kl. 15 og í Skálavík kl. 16. Møti verður í Ungmannafelagshúsinum Samljóð í Skopun kl. 20.
Sunnudagin 29. verður møti í Samljóð kl. 11 og 15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Malan Hentze og Helenu Petersen. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánakvøldið kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Andreas Djurhuus og Eivind Bech, øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin í Vági**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Eddie, Sámal og Noomi. Mánakvøldið kl. 20 heimaforbundið.

**Missiónshúsið í Sumba**
Sunnudagin kl. 18 møti við Árna og Ásbjørg Kjærbech. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 23. apríl:*
kl. 09.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen.
kl. 10.15-18.00 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresu felagsskapin.
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl
*Týsdagin 24. apríl:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Hugleiðingar um Havnina í 1920'unum. Annar partur Hjørdis Háberg, Marjun Nielsen lesur
*Mikudagin 25. apríl:*
**Stongt**
*Hósdagin 26. apríl:*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 27. apríl:*
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Felagið Tórshavn gongutúrur**
Sunnudagin 22. apríl verður gongutúrur til Kaldbaksvøtnini og Tíggjará. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10. Havið heit og góð gonguklæði og ein drekkamunn við. Tilmelding.

**Eysturoyar Gongufelag/Kunningarstova**
Fyrsti gongutúrur í ár verður sunnudagin 22. apríl. Gingið verður runt Eiðisvatn. Túrurin er léttur. Vit møtast við byrgingina kl. 14.00. Á hesum fyrsta túri eru øll vækomin við. Tekning fer fram á Eysturoyar kunningarstovu tlf. 449449.

**Vágs Matmøðrafelag**
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða leygardagin kl. 17.00-18.00, sunnudagin kl. 11.00-12.00 og mánakvøldið kl. 20.00-21.00.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Føroyingafelagið í Århus**
Flaggdagshald í Áarstovu mikudagin 25. apríl kl. 19.00. Tór Verland Johansen fer at flyta fram flaggdagsrøðuna. Álakórið úr Ålborg fer at syngja. Kaffi og køkur verður at fáa til keyps.

**Javni N. Finsensgøta 32**
Skrivstovan er á Hoydalsveg 40, 3. hædd (ovast)
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl. 10-14
Fríggjadag kl. 13-16
Tlf. 314827 Fax 310557
e-mail:
javni@post.olivant.fo

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið**
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*"Blæsir tú á ein neista, flammar hann upp, men spýtur tú á hann, slóknar hann - og bæði tvey koma úr munni tínum"*

Soleiðis stendur í Sikars bók kap.28.12. Um Ábraham hevði blást á neistan, sum lá og gløddi, tá ið hirðar hansara og Lots byrjaðu at gerast ósamdir, hevði tað enda í øðiligum skeldaríi og slagsmáli, ikki bara millum hirðarnar, tí eisini millum Ábraham og Lot hevði fíggindskapurin reist seg til ein veldugan eld, serstakliga tá ið Lot valdi sær tey grønastu jarðarstykkini. Men Ábraham livdi við Guði, sum ber vakra navnið Guð friðarins. Tí vildi hann fegin liva sum barn friðarins. So spýtti hann á neistan, so at hann ikki slapp at flamma upp og gerast eitt stórt bál. Hann tosaði síðan blíðliga við Lot, so at teir kundu skiljast í friði, tað er ólíka nógv betri enn at liva í ófriði, tí tá ið vit skiljast í friði, eru vit altíð tilreiðar at hjálpa hvør øðrum á neyðar degi. Tað fekk Lot eisini at sanna; tá ið hann seinni varð settur í fangahús, kom Ábraham við 318 monnum og fríðaði hann.

Vit kenna øll málburðin at brúka munn, tá verður muðurin brúktur at blæsa neistan upp við illum, beiskum, ósonnum og sleygandi orðum. Mong menniskju hava ljótan munn. Men fær Jesus loyvið at ráða í hjartanum, lærir hann okkum at hava ein vakran munn og tosa satt, so at fólk kunnu fegnast um tað. Og tað er ólíka nógv betrið enn at brúka stór orð og altíð skulla hava seinasta orðið. Liv við Jesusi, so fær tú náði at blæsa á neistan tá ið tað er neyðugt og at spýta á hann tá ið tað er neyðugt.

**John S. Myllhamar, trúboðari**


HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56




Leygardagin 21.04. kl. $19^{00}$
Leygardagin 21.04. kl. $21^{15}$
Leygardagin 21.04. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 22.04. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 22.04. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 22.04. kl. $22^{45}$




Leygardagin 21.04. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 22.04. kl. $20^{00}$




Leygardagin 21.04. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 22.04. kl. $22^{30}$




Leygardagin 21.04. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 22.04. kl. $18^{00}$
*– Seinasta sýning*

KOMANDI FILMU<R




Frumsýning
Fríggjadagin 27.04.




Frumsýning
Fríggjadagin 27.04.

www.in.fo/havnarbio